

Ein handverkari, sum er í tríati árunum verður ofta mettur at vera komin á tindin í sínum yrki. Hann hevur lærdómin og royndirnar, sum gera, at hann er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, heldur Kári Johannesen

# Tað er trot á handverkarum í bestu árum

*Kreppan fyrrapartin í níti árunum hevði við sær, at nógvir handverkarar fóru úr vinnuni, og at næstan eingir unglingar fingu lærusáttmála*

Jóannes Hansen

Tað eru ov fáir maskinsmiðir í Føroyum, sum eru í tríati árunum, og tað kastar skuggar á vinnuna nú, og fer ivaleyst at gera tað í fleiri ár fram í tíðina.

Ein handverkari, sum er í tríati árunum verður ofta mettur at vera komin á tindin í sínum yrki. Hann hevur lærdómin og royndirnar, sum gera, at hann er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, hann er væl førur fyri at tilogna sær tað nýggja, sum kemur undan kavi í fakinum, og hann er á tindinum, hvat likamsevnum viðvíkur.

Men sambært Kára Johannesen í Fuglafirði, sum eigur Hydro–Tech á Eiði og KJ–Hydraulik á Kambsdali, so eru fáir maskinsmiðir í hesum aldrinum.

Á teimum báðu omanfyri nevndu virkjunum eru 72 fólk í starvi. 56 av teimum eru handverkarar og handverkslærlingar. Níggju eru yngri enn tjúgu ár, fýra og tredivu eru í tjúgunum, trettan eru í fjøritunum, fýra eru í fimti árunum, og tríggir eru omanfyri seksti ára gamlir.

Í tredivunum eru bara níggju.

– Hetta er ikki tað aldursbýtið, sum var vanligt ímillum handverkarar fram til síðst í áttati árunum. Eg var liðugur at læra í 1968. Tá og í langa tíð eftir tað var tað vanligt, at nógvir handverkarar vóru í bestu árum, sigur Kári Johannesen, sum dugir væl at síggja orsøkina til, at smiðirnir í tríati árunum eru so fáir:

– Kreppan fyrrapartin av níti árunum er høvuðsorsøkin til, at tað stendur soleiðis til. Arbeiðsloysið hevði við sær, at nógvir ungir handverkarar fóru av landinum. Summir fóru at útbúgva seg, summir fluttu og fingu sama slag av arbeiði, sum teir høvdu havt, og uppaftur aðrir fóru at arbeiða uttanlands og varðveittu bústaðin í Føroyum.

### Skuggarnir

Kári Johannesen heldur, at tað fer at síggjast aftur í fleiri ár, at tað er ein aldudalur, har handverkararnir hava verið roknaðir at vera komnir í besta aldur:

– Eitt er, at fyritøkurnar sakna, at hesin aldursbólkurin ikki er so stórur í arbeiðsmegini, sum hann hevur verið. Eitt annað er, at lærlingarnir sakna hesar sveinarnar at læra av. Í báðum førum er talan um óhepnar avleiðingar, sum tað fer at taka rúma tíð at sleppa av við.

### Flest í Eysturoy

Kári Johannesen hevur sjálvsagt serligan áhuga fyri maskinsmíð fakinum. Í Eysturoy hava maskinverkstaðirnir altíð verið nógvir, og tískil hevur talið á maskinsmiðjum sammett við aðra staðni verið høgt í oynni. Sum omanfyri nevnt, so eru í teimum báðu fyritøkunum hjá Kára Johannesen 56 í maskinsmíð fakinum.

– Samlaða talið í oynni hevur verið hægri, enn tað er nú, men tað er framvegis hægsta talið í landinum. Tað eru umleið tvey hundrað maskinsmiðir og lærlingar í oynni, og tað svarar til umleið tvey prosent av samlaða fólkatalinum í Eysturoy. Í hinum oyggjunum er talið upp á seg lægri, og eg rokni við, at miðaltalið fyri alt landið liggur onkra staðni ímillum 1,0 og 1,5 prosent. Tá vit hugsa um avbjóðingarnar, sum standa fyri framman í einari møguligari oljuvinnu, so er talið ikki nóg høgt, heldur Kári Johannesen.

# Úr kjallaranum og til 72 fólk í starvi

*Fyritøkan hjá Kára Johannesen í Fuglafirði hevur síðani byrjanina í 1978 ment seg til eina av teimum stóru innan maskinsmíði*

Jóannes Hansen

Tá vinnan í Eysturoy herfyri skipaði fyri fundi at lýsa støðuna hjá ymsu tættunum í vinnuni í oynni var Kári Johannesen í Fuglafirði tann, sum hevði orðið vegna tænastuvinnurnar í oynni.

Kári Johannesen vísti á, at í Eysturoy eru nógvar tænastuvinnur, sum veita vinnulívinum, húsarhaldunum og tí einstaka eina fjøld av ymiskum tænastum.

Fyri at lýsa umstøðurnar og korini hjá tænastuvinnuni í Eysturoy, brúkti Kári Johannesen sítt egna virki sum dømi. Á fundinum vóru bæði lands– og lokalpolitikarar. Kári Johannesen nýtti høvið at lýsa viðurskifti, sum hann við royndum frá sínum virkjum vildi ynskt vóru øðrvísi. Hetta hava vit eitt sindur meiri um aðra staðni á hesi síðuni.

Men áðrenn umboðið fyri tænastuvinnurnar í Eysturoy kom so langt, greiddi hann fundinum frá, hvør hann var, og hvussu gongdin og vit kunnu avgjørt siga menningin hevur verið á hansara egna virki.

Øll mundu samtykkja við Dan Reinert Petersen, løgtingsmanni, tá hann undir orðaskiftinum helt, at alt tað, ið var komið fram í lýsingini av støðuni hjá vinnuni, var sera áhugavert, men at eingin tók honum tað illa upp, tá hann gav til kennar, at lýsingin, sum Kári Johannesen hevði havt av, hvussu virkið hjá honum hevði virkað og ment seg, var serliga áhugaverd.

Tað halda vit eisini, at hon var.

### Sólskynssøgan

KJ–Hydraulik á Kambsdali er eitt av virkisnøvnunum, sum tað tey seinnu árini hevur verið alt meiri at hoyrt um, og hesa seinastu tíðina hevur ikki so sjáldan verið at hoyrt um Hydro–Tech á Eiði.

Aftanfyri hesi bæði eru feløg, sum arbeiða innan maskinsmíð, og sum umframt til skip, bátar og onnur, ið brúka hydraulik, eisini veita tænastur til alivinnuna.

Felags fyri bæði feløgini er, at tað er ein og sami maður, sum er ánari. Maðurin eitur Kári Johannesen. Hann er ættaður úr Fuglafirði, og hann býr í Fuglafirði.

Í 1978 fór hann at arbeiða fyri seg sjálvan í kjallaranum heima hjá sær sjálvum í Fuglafirði. Virksemið øktist stútt og støðugt. Fleiri fólk komu í arbeiði, og í 1988 varð virkið flutt út á Kambs dal í nýggjan bygning, og í hesi 570 fermetra stóru høllini halda teir framvegis til.

Hjá pf. Kára Johannesen maskinsverkstaði á Kambs dali, sum hevur hjánavnið KJ–Hydraulik, starvast 47 fólk. 35 teirra starvast í maskinsmíðfakinum, og Kári Johannesen er sjálvur stjóri.

Kári Johannesen eigur og er nevndarformaður í Hydro–Tech á Eiði. Á hesum arbeiðsplássinum eru 23 fólk, og 20 eru í maskinsmíðfakinum. Virkið á Eiði heldur til í einum fýra hundrað fermetra stórum bygningi á havnarlagnum, og nú verður ein nýggjur bygningur upp á tólv hundrað fermetrar bygdur við síðuna av.

Á virkjunum á Kambsdali og á Eiði eru sostatt 72 fólk í starvi, og av teimum eru 22 lærlingar: 19 maskinsmíðlærlingar, ein goymslulærlingur og tveir skrivstovulærlingar.

### Lønin fer víða

Í fjør vóru samlaðu lønargjaldingarnar 13,1 milliónir krónur. Um lønarveitingarnar verða roknaðar til eitt miðal tal fyri øll starvsfólkini – tá verður roknað við, at lærlingarnir fáa somu miðalløn sum hini starvsfólkini – so var miðalinntøkan í fjør 187 túsund krónur.

Tá havt verður í huga, hvørja tímaløn handverkarar fáa, og at ein lítil triðingur av arbeiðsfólkunum vóru lærlingar, sum ikki fáa fulla løn, so boðar miðallønin frá, at starvsfólkini í miðal hava arbeitt eitt stórt tal av tímum í 1999.

Umframt at arbeiða undir taki á omanfyri nevndu plássum, so gongur ein ikki so lítil partur av virkseminum fyri seg hjá fyritøkunum, sum fáa tænasturnar veittar á staðnum. Her er eitt nú talan um skip og alibrúk. Tað kemur meiri enn so fyri seg, at arbeiðsfólk verða send av landinum í arbeiðsørindum. Hetta sást í fjør aftur í, at umleið tíggju prosent av umsetninginum stavaðu aðra staðni frá enn úr Føroyum.

Lønirnar frá teimum báðum virkjunum fara víða, tí tey 72 starvsfólkini eru úr fimtan býum og bygdum í Eysturoy (av Toftum og Strondum og norður til Eiðis) og Streymoy (úr Havnini og norður til Haldarsvíkar).

## Fokus á vinnuna í Eysturoy

Greinarnar í dag eru tær síðstu í røðini í einari lýsing av vinnuni í Eysturoy. Vinnan í Eysturoy skipaði mánakvøldið 10. januar fyri fundi, har umleið hálvt annað hundrað fólk úr vinnuni í oynni luttóku. Burturúr tí, sum varð lagt fram, hava vit umframt í dag, havt tvær aðrar opnir í blaðnum – hin fyrra týsdagin 18. januar og hin seinna fríggjadagin 28. januar.

Umframt tað, ið er komið fram í blaðnum, varð m. a. nógv gjørt burturúr at sannføra vinnuna og politikararnar um, at Eysturoyggin og Skálafjørðurin er best egnaða økið til útgerðarhavn fyri oljuvinnuna.



# Lærlingarnir ganga ov leingi í skúla

*Meistari sigur seg hava ítøkiligt dømi um, at tekniski skúlin gevur ikki nóg holla undirvísing í nýtslu av nýmótans amboðum*

Jóannes Hansen

Hóast tíðin, sum lærlingarnir eru í tekniska skúlanum er nógv longd, og hóast almenni skúlaførleikin hjá lærlingunum er nógv betri nú, enn hann var fyri einum ættarliði síðani, so er frálæran ikki vorðin betri.

Hesa staðfestingina segði Kári Johannesen, sum eigur KJ–Hydraulik á Kambsdali og Hydro–Tech á Eiði, seg hava gjørt. Í løtuni hava tey bæði virkini hjá honum nítjan maskinsmíðlærlingar, og Kári Johannesen heldur, at teir kundu fingið meiri burturúr teimum 55 vikunum, sum teir eru í skúla, enn teir fáa nú. Hann helt, at tað hevði verið skilagott at stytt fyrsta skúlaskeiðið úr 20 og niður í 10 vikur, og hann gav hetta ynskið víðari til politikararnar, sum vóru á fundinum, ið vinnan í Eysturoy skipaði fyri, at arbeiða víðari við.

– Fram til sjeyti árini høvdu flestu lærlingarnir sjey ára skúlagongd, og tá teir lærdu, vóru teir tilsaman í umleið tjúgu vikur í tekniska skúlanum. Nú hava allir teir, sum koma í læru, gingið í skúla í níggju ella tíggju ár. Onkrir hava SIT frá tekniska skúlanum, og summir hava studentsprógv. Harafturat kemur, at samlaða tíðin í tekniska skúlanum er 55 vikur.

Út frá hesum veruleikanum helt Kári Johannesen, at lærlingarnir eru ov lítið úti á virkjunum, og at hetta gongur bæði út yvir virkini og lærlingarnar:

– Lærutíðin er fýra ár, men fleiri lærlingar søkja um niðursetta lærutíð – úr trimum mánaðum og upp í eitt hálvt ár. Teir hava eina ella aðra orsøk fyri tí, sum ger, at umsóknin í flestu førum verður váttað. Um vit rokna stytta lærutíð, summarfrí og annað uppí, so fáa vit tað úrslitið, at vit á virkjunum hava lærlingin í 110 vikur, og skúlin hevur hann í 55 vikur. Tað almenna rindar lønina, meðan teir eru í skúla. Meistarin ger tað í fyrsta umfari, men so fær hann útreiðsluna endurgoldna.

### Allir vinna

Kári Johannesen segði seg vita, at lærlingarnir, ið allir eru ungir og raskir, kenna seg bremsaðar í fyrsta skúlaskeiðnum, sum er 20 vikur. Skúlin er teimum ov lítil avbjóðing, og tey kenna tað sum um tey hava ov lítið at takast við.

– Eg havi tosað við tey flestu teirra, og tað er sama søgan. Tey eru vaksin fólk, sum keða seg. Eg fari tí at mæla politikarunum til at arbeiða fyri, at hetta fyrsta skúlaskeiðið í staðin fyri 20 verður tíggju vikur. Um vit hava og løna lærlingunum í hesar vikurnar meiri, so sparir tað almenna samsvarandi í løn til lærlingarnar.

### Áhugi fyri samstarvi

Tað verður nógv tosað um oljuvinnuna og um at føroyska vinnan skal vera klár at taka við avbjóðingunum, sum nýggja vinnan fer at bera við sær. Kári Johannesen nevndi eitt ítøkiligt dømi, har hann helt seg hava staðfest, at lærlingarnir verða ikki nóg døgført skúlaðir til nýggju avbjóðingarnar:

– Okkara fyritøka hevur verið á nógvum oljuframsýningum. Í 1998 vóru við í Stavanger. Har royndu vit at fáa samstarv í lag við fyritøkur av sama slagi sum okkara og sum arbeiddu í oljuvinnuni. Vit ætlaðu at býta um fólk við teir, og eg legði upp til, at vit kundu senda nakrar menn til teirra í eitt tíðarskeið, og um arbeiði av sama slagi var hjá okkum, so kundu teir senda fólk henda vegin.

– Felagið, sum vit høvdu verið í sambandi við, var áhugað í samstarvi. Teir høvdu brúk fyri seks fólkum, sum kundu arbeiða við teldustýrdum maskinum, tveimum verkfrøðingum – teir kundu vera nýútbúnir og harvið óroyndir. Felagið bjóðaði sær til at læra teir upp, og so kundu teir koma í vinnu hjá okkum, tá ið oljuvinnan verður veruleiki her.

Hetta helt Kári Johannesen ljóðaði spennandi. Teir høvdu tó ongar sveinar, sum dugdu at arbeiða við teldustýrdum maskinum, og teir høvdu heldur ongar verkfrøðingar. Teir á Kambsdali høvdu heldur onga teldustýrda maskinu. Men tekniski skúli hevði eina, men eingin lærlingur hevði lært at brúka hana.

### Fáa nyttu úr lærutíðini

Um KJ–Hydraulik skuldi hava møguleika fyri at fáa kunnleika til tílíkar maskinur, so vóru teir noyddir at keypa eina, og síðsta summar keyptu teir eina sovorna, sum tveir av monnunum settu seg inn í at brúka.

– Eg haldi, at hetta átti at havt verið ein uppløgd uppgáva hjá tekniska skúlanum at taka sær av. Tí fari eg at skjóta upp, at seks av teimum tólv spardu vikunum, sum eg sipaði til í áðni, kundu verið brúktar til hesa upplæringina. Tað vil við øðrum orðum siga, at í seks vikur kundu lærlingarnir á skúlanum fingið áðurnevndu upplæring, meðan hinar seks í fyrsta skúlaskeiðnum spardu vikurnar kundi tað almenna spart lønarútreiðslurnar til og harvið havt pengar at keypa skúlanum útgerð fyri, helt Kári Johannesen fyri.

Hann visti at siga, at sum er hevur tekniski skúlin bara eina teldustýrda maskinu. Tað eru fimtan lærlingar, sum samstundis skulu undirvísast, og so sigur tað seg sjálvt, at hetta ber ikki so væl til.

### Vinnan uppií

Signar á Brúnni, landsstýrismaður í skúlamálum, var á fundinum. Hann segði seg skilja boðskapin hjá virkiseigaranum, men hann segði seg samstundis undrast á, at vinnan ikki hevði ávirkað skúlatíðina meiri, enn hon eftir útsøgnini á hesum fundinum hevði fingið burturúr:

– Vinnan hevur síni umboð í yrkisnevndini og hevði síni umboð í víðkaða læruráðnum. Men um vinnan ynskir, at viðurskiftini skulu broytast, so eru vit klárir at taka spurningin til viðgerðar segði landsstýrismaðurin.

Kári Johannesen ynskti ikki at fara út í nakað orðaskifti á fundinum við landsstýrismannin, men hann gav til kennar, at tað er framvegis ikki væl dámt av teimum, sum á arbeiðsplássunum hava ábyrgd av lærlingunum, at nógv bendir á, at hugtakið meistaralæra kámast alt meiri og meiri:

– Nú stendur ikki í bløðunum longur, hvør lærumeistarin hevur verið, tá lærlingar eru avlærdir. Nú fær lærlingurin ikki sveinabræv, men hann fær í staðin eitt útbúgvingarskjal, og hetta eru ikki allir so fegnir um.



*Kári Johannesen heldur, at tað hevði verið skilagott at stytt fyrsta skúlaskeiðið hjá lærlingunum úr 20 og niður í 10 vikur*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

